Samstarvið millum koyrilærarar ov vánaligt

Óli Jacobsen, fyrrverandi koyrilærari, heldur at samstarvið millum koyrilærararnir er ov vánaligt. Hann gavst við frálæruni fyri hálvum øðrum ári síðan, eftir at hava verið koyrilærari í tredivu ár.

Eli Guttesen

– Einasti møguleiki fyri at fáa skil á ferðslumentanini hjá føroyingum er, at fáa betri samstarv millum allar teir partar, sum hava við ferðslu at gera. Eg dugi ikki at siggja, at vit hava størvegis annað í at velja. Bara at kasta skuldina hvør yvir á annan loysir ongar trupulleikar, sigur Óli Jacobsen.

Gavst við frálæruni

– Fleiri orsøkir vóru fyri at eg gavst við frálæruni. Eg eri ikki nakar ungur maður longur og heilsan er heldur ikki av teimum bestu. Fyri at fáa nakað burtur úr arbeiðinum gjørdust dagarnir ofta langir og stravnir.

– Ein onnur orsøk var, at úrslitið av frálæruni ikki var nøktandi. Ov nógv klandur millum koyrilærarnar gjørdi tað ikki betur. Koyrilærarnir duga ikki at samstarva, tí dugdu teir tað vildi úrslitið víst seg av sær sjálvum.

Skilið vánaligt

– Tað virkar stoytandi á meg at hoyra hesar ungu fartglaðu bilførarnar tosa. Tað ringasta er, at teir halda tað vera púrasta í ordan at koyra skjótt. Teir duga ikki at siggja, at við skilaleysu koyringin seta teir onnur í vanda, umframt seg sjálvan.

Óli metur ikki, at tað er nakað gott hugskot, at tey ungu fáa oyggjarvegin at spæla sær á fyri at fáa fartfeburin úr blóðinum. Tílíkt má ikki fara fram á almennum vegi. Skal koyri-breyt gerast noyðist henda at vera undir skipaðum eftirliti á avbyrgdum øki.

Hugburðurin má broytast

Óli heldur ikki at nakað er í pástandinum um at feilurin liggur á lóggávuøkinum.

– Lógini feilar einki, heldur er tað mátin tað heila verður gjørt upp á, sum er skeivur. Lógin er í ordan og upplæringarskipanin hjá koyrilærarunum er eisini nóg góð. Tú kann ikki broyta hugburðin hjá fólki frá degi til dags. Fyri at broyta hugburðin hjá fólki, mugu vit byrja við børnunum og kunnu foreldrini hjálpa til, vil úrslitið bara gerast betri.

Tey ungu fáa eina rúgvu av undirvísing í ferðslumentan tá tey ganga til koyrifrálæru. Men tá er ov seint at fáa broytt tað fatan summi hava av hvussu tey skulu uppføra seg í ferðsluni.

Bileftirlitið ikki skuldina

– Eg havi samstarva fínt við bileftirlitið øll hesi árini og havi einki ilt at bera teimum. Men heldur er tað samstarvið millum okkum sum kollegar, sum ikki hevur verið nøktandi. Kappingin um kundarnir hevur møguliga gjørt sítt til, at samstarvið ikki hevur rigga so væl. Útspilling av hvør øðrum burdi ikki funnið stað millum koyrilærarir, tí hetta gagnar ikki frálæruni.

Koyrikortið er dýrt

Tá meirvirðisgjaldið kom gjørdist dýrari at taka koyrikort. Tá Óli gavst við frálæruni fyri hálvum øðrum árið síðan kostaði eitt teoriskeið upp á um 32 tímar, 1500 kr. Umframt hetta skuldi gjaldast 250 kr fyri hvønn koyritíma. Sera ymiskt var hvussu nógvum tímum tørvur var á hjá teimum ymisku næmingunum. Men Óli sigur, at ein góður regul var at siga, at neyðuga tímatalið fylgdi aldrinum. Eldri fólk krevja vanliga størri praktiska frálæru um tey ikki hava koyrt áður.

Óli Jacobsen, koyrilærari í 30 ár, mælir til økt samstarv fyri at hækka støðið á ferðslumentanini.
Mynd: Kalmar Lindenskov

Nýstovnað felag skipar fyri stórfingnari gospelfestival

Tað kann tykjast sum ein heldur ógvuslig byrjan hjá nýstovnaðum felagi at skula skipa fyri stórari og víttfevnandi festival í mei. Men tað er í øllum førum støðan hjá Føroya Gospeltónleikafelag, sum sá dagsins ljós í november í fjør.

Snorri Brend

Føroya Gospeltonleikafelag fer vikuskiftið 23. og 24. mei at skipa fyri spennandi og stórfingnari gospelfestival í Ítróttarhøllini í Havn. Høvuðsnavnið á festivalini er »King of Gospel«, Andrae Chrouch.

Á skránni hetta vikuskiftið verða tríggjar konsertir, har nýggir bólkar og góð gomul nøvn fara at luttaka. Ein konsert verður fríggjakvøldið og tvær konsertir leygardagin.

Umframt hesar konsertir er ætlanin at hava eina missiónsframsýning í høllini, har ymiskir trúboðarafelagsskapir fáa høvi at lýsa arbeiðið sítt úti og heima.

Førosykir tónleikarar og kórsangarar

Høvuðsnavnið á festivalini er Andrae Chrouch, og verður einastu luttakarin á pallinum undir konsertini fríggjakvøldið, væl stuðlaður av føroyskum tónleikarum og føroyskum kórsangarum.

Ætlanin er, at gospelhugaðir sangarar og tónleikarar skulu sleppa upp í part undir hesi konsertini. Eitt føroyskt kór og ein føroyskur tónleikabólkur skulu luttaka saman við Andrae Chrouch á pallinum.

Fyri venjingini av kórinum stendur Eiríkur Skála, og miðar hann eftir at hava millum 25 og 30 sangarar í kórinum. Í løtuni er bíðilisti hjá kvinnurøddum at sleppa við, meðan hann væl kundi hugsað sær at fingið fleiri royndar mansrøddir við í kórið. Annars ljóðar kórið sera væl, skilst.

Leygardagin kl. 15 verður so onnur konsertin, tá fýra føroyskir bólkar fara at luttaka. Teir eru I Am úr Klaksvík, Visible Fish, Seven av Skálafjørðinum og Sigrid og hennara fólk.

Um kvøldið verður so seinasta konsertin, tá Regin Guttesen og hansara menn fara at spæla, eins og ein nýggjur bólkur úr Eysturoynni fer at luttaka.

Á hesi konsertini fer harafturat eitt íslendskt kór at luttaka. Tey frættu um, at Andrae Chrouch kom til Føroyar, og vildu fegin fáa høvi at lurta eftir honum her. Og soleiðis bar tað til, at tey eisini koma at luttaka á Gospelfestivalini '97.

Høvuðsnavnið á Gospelfestivalini '97 er Andrae Chrouch, sum man vera millum bestu klaverspælarar í heiminum

Klaksvíkingar blása í 25 nýggj ljóðføri

5. apríl '97 verður ein søguligur dagur hjá teimum 32 blásarunum í Klaksvíkar Hornorkestri. Tí kl. 15 í dag fær orkestrið handað 25 nýggj ljóðføri, sum framleidd eru í Onglandi.

Snorri Brend

Kostnaðurin av hesum ljóðførunum er umleið 430.000 kr. Av hesum hevur hornorkestrið sjálvt útvegað helvtina av penginum við ymiskum peningasavnandi tiltøkum. Ljóðførini eru bíløgd frá Tónastovuni hjá John Mouritsen í Sørvági.

Í samband við handanina seinnapartin í dag ætlar hornorkestrið at gera eitt sindur burtur úr, við eini hugnaligari løtu í venjingarhølunum í Brandstøðini. Her vera m.a. umboð fyri Býráðið í Klaksvík og stuðlarnir hjá orkestrinum bodnir við. Fyri hornorkestrið fer Magnus Arge at siga nøkur orð.

Í Klaksvíkar Hornorkestri eru sum nevnt 32 blásarar í øllum aldri. Teir eru í løtuni í ferð við at venja til næstu stóru uppgávuna – hornorkesturstevnuna í Fuglafirði, sum verður 26. apríl.

Nýggj Norðurlond í nýggjum kóri

Sangarar úr øllum Norðurlondum – eisini baltisku londunum – fer at seta stóru mentunarstevnuna, sum verður hildin í Riga. Eisini Føroyar hava eitt umboð í kórinum. Sopranurin Petra Iversen er millum teir ellivu sangararnar.

Katrin Petersen

Kórsangur á hægsta støði verður tað fyrsta, ið verður at hoyra á stóru norðurlendsku mentunarstevnuni, sum verður sett í Riga 5. apríl. Ellivu kórsangarar eru útvaldir, ein fyri hvørt landið. Tó undantikið Grønland, har ongin slapp gjøgnum náløreygað.

Baltisku londini, Estland, Lettland og Litavia vilja fegin roknast sum Norðurlond – tey hava fýra umboð í kórinum.

Petra Iversen úr Kvívík er ein av teimum trimum sopranunum. Hon er kend í føroysku kórverðini – 34 ára gamla sangarinnan er við í fleiri kórum í Havn.

Fyrireikararnir vænta at nógv meira verður at hoyra til norðurlendska kórið – serliga nú baltisku londini eru vorðin meira norðurlendsk.

At nærum øll londini eru umboðaði skal fáa líkleika og munir fram londini ímillum.

Okkum tørvar føroyska loysn á føroyskari oljuvinnu

Suni á Dalbø

Kronikkin

Tann fyrsta av eini væntandi røð av oljuráðstevnum varð hildin í Norðurlandahúsinum í Havn í døgunum 5. og 6. mars. Ráðstevnan varð fyriskipað av FOÍ saman við feløgunum í Amerada Hess Group, The Faroese Partnership, ið er samtak myndað av feløgunum Amerada Hess, Lasmo, Norsk Hydro og DONG.

Avrikini viðvíkjandi nærum øllum *praktiskum viðurskiftum* í Norðurlandahúsinum hesar báðar dagarnar vóru eftir mínari metan til eitt reint UG. Alt frá hølisviðurskiftum og mati til tilevning av prentlutum var sera væl úr hondum greitt. Um vit siggja oljuráðstevnuna sum tað, hon nú einaferð var, nevniliga eitt legitimt PR nummar fyri omanfyri nevndu oljufeløg, so er eingin ivi um, at henda ráðstevnan eydnaðist væl. Men í innbjóðingini frá FOÍ varð ráðstevnan annars víst fram sum eitt høvi hjá *føroyska vinnulívinum* at fáa eina ábending um tey krøv og tær avbjóðingar, ið skjótt kunnu gerast viðkomandi í sambandi við eina ábending um tey krøv og tær avbjóðingar, ið skjótt kunnu gerast viðkomandi í sambandi við eina møguliga oljuvinnu í Føroyum; skal *hetta* vera grundarlag undir eini eftirmetan av ráðstevnuni, so er heldur talan um eitt TG fyri ikki nøktandi avrik.

Veruleikin vísti seg at vera tann, at sjálvt um hesi oljufeløg í nógvar mánaðir hava vitað, at teir skuldu halda eina ráðstevnu í Føroyum *við føroyskari vinnu sum málbólki*, so høvdu hesi feløg ikki ómakað sær at fyrireikað seg til fyrispurningar frá føroyskum vinnulívi um ítøkiligar møguleikar fyri luttøku í eini føroyskari, ella fyri tað *útlendskari*, oljuvinnu (líka væl sum útlendingar kunnu arbeiða í eini møguligari føroyskari oljuvinnu, kunnu vit sjálvandi arbeiða í eini útlendskari ditto). Teir útlendsku luttakararnir hildu seg ístaðin til at rósa Føroya Oljuídnaði og føroyskum fyrilesarum fyri eitt ótrúliga høgt støði á ráðstevnuni, meðan tað í framløguni hjá FOÍ í høvuðsheitum varð víst á egnar dygdir og avrik – at hugsa sær, føroyingar duga bæði at skipa fyri ráðstevnum og at halda fyrilestrar!

Føroyingar, vaknið! Dagarnir, tá vit við reyðum kjálkum gjørdust ernir av útlendskum rósi, mugu vera taldir. Somuleiðis mugu dagarnir við einstaklinga marglæti, sjálvklókum serfrøðingum, egosentreraðum vinnulívsmonnum, 'stongdum hurðum' og lokalpolitiskum idiotpolitikki eisini vera taldir. Ein *hugburðarbroyting* er fyritreyt nummar eitt, fyri at vit kunnu gera okkum vónir um, at oljan kann gerast ein sunnur og burðardyggur stuðul fyri føroyskan búskap í árum framyvir.

Tað er altumráðandi, at vit føroyingar duga at rokna okkum fram til, hvørji áhugamál vit sjálv og kanska mest av øllum *aðrir* hava í sambandi við eina møguliga oljuvinnu í Føroyum. Vit mugu gera okkum sjálvum greitt, hvat *vit vilja*, at ein møgulig komandi oljuvinna skal bera í sær. Lat okkum fyri Guds skyld ikki byrja at byggja nýggjar brýr, vegir, berghol og flogvøllir, eitt nú orsakað av, at onkur tilvildarligur eingilskmaður hevur trupulleikar við tí veruleika, at Føroyar geografiskt liggja í tí mangan baldruta Norðuratlantshavinum ... henda veruleika kunnu vit í øllum førum ikki gera nakað við.

Natúrligur partur av føroyskari vinnu- og ídnaðarstrategi

Oljuvinnuspurningurin eigur harafturímóti at blíva ein integreraður partur av eini *føroyskari* vinnu- og ídnaðarstrategi, sum hevur sum útgangspunkt, at Føroyar eru 18 oyggjar, sum allar, hvør í sínum lagi, hava rætt til eitt sosial-økonomiskt tilverugrundarlag, hetta veri seg ídnaður, landbúnaður, umsiting, fiskiskapur, handil og/ella onnur vinna. Smáar oyggjar og bygdir so sum t.d. Koltur, Mykines og Gásadalur eru longu farnar ella eru um at fara í søguna. Hetta rák er síðani byrjað at »eta« seg ígjøgnum øki sum Norðoyggjar, Sandoy, partar av Suðuroy og Vágum, ja nú er borgarstjórin í tí næststørstu kommununi í Føroyum eisini byrjaður at tosa um vandan fyri avtoftan *har*, um einki munagott hendir. Ein vinnu- og ídnaðarstrategi, sum byggir á *samfelagsliga javnvág*, er ikki einans eftirynskjandi, hon er bráðneyðug.

Ein tílík javnvág er sjálvandi ikki neyðug, um allir føroyingar skulu búgva í miðstaðarøkinum. Um ein hugsjón fyri einar framtíðar Føroyar byggir á, at tað er líkamikið, um tað er møguligt at búgva á 16 ella 17 av teimum 18 oyggjunum, so er eingin orsøk at arbeiða við eini strategi, sum byggir á samfelagsliga javnvág, tí so er tann trupulleikin ikki til. Men skulu vit búleikast í Føroyum, *har »Føroyar« merkir allar 18 oyggjarnar,* so verður neyðugt við einum politikki, sum tekur hædd fyri, at fólk, tá ið alt kemur til alt, búleikast, har ið tað eru realistiskir møguleikar fyri einum sosialøkonomiskum tilverugrundarlagi.

Eitt felags føroyskt argument

Longu nú, áðrenn oljuvinna yvirhøvur er veruleiki í Føroyum, eru fleiri ábendingar komnar um, at vit føroyingar sleppa ikki at luttaka í hesi vinnu, uttan so at vit sjálv krevja hetta. Dømi um hetta eru 1) at Landsverkfrøðingurin ikki var við í »Lopra-1« verkætlanini, 2) at Tryggingarsambandið heldur ikki varð eftirspurt í hesum sambandi, og 3) føroyingar eiga ríkar møguleikar viðvíkjandi møguligum hjálparskipum, men hóast hetta varð case-bátur leigaður uttanlands, tá ið tørvur var á hjálparskipi. Eg eri sjálvandi greiður um, at veruleikin ikki er svart/hvítur, og at tað uttan iva finnast frágreiðingar til hvørt av hesum dømum; tær skulu nokk greiða frá, at tað »kundi ikki verða øðrvísi«. Uttan mun til hesar frágreiðingar, so er veruleikin tann, at skulu vit einans takast við í tann mun, útlendsku oljufeløgini sjálv vilja tað, ja so verður føroyska úrtøkan, ikki minst viðvíkjandi vitan og førleika (know-how & competence) mangan soltin.

Velja vit harafturímóti at standa saman um eina *føroyska loysn* á eina føroyska oljuvinnu, so eru møguleikar fyri at fáa væl burturúr, eisini tá ið hugsað verður um lyklaøkini 'vitan og førleika'. Tað er í stóran mun uppgávan hjá føroyskum myndugleikum, *bæði lands og kommunalmyndugleikum,* at skipa soleiðis fyri, at gongdin ikki verður tann, at tað einans verða oljufeløgini, saman við nøkrum føroyskum einstaklingum, sum fáa ágóðan av eini møguligari komandi oljuvinnu í Føroyum. Ein hugburðarbroyting, sum kann opna og styrkja tilgongdina, byggir á, at bæði landsog kommunalpolitikarar fáast til at skilja, at einans saman standa vit sterk; okkara møguleikar í sambandi við oljuvinnuna eru neyvt tengdir at, at vit standa saman um *eitt felags føroyskt argument*.

Ein av *argumentunum* fyri Føroyar í sambandi við eina møguliga oljuvinnu er, at vit ikki kunnu velja at gera nýtslu av okkara potentiella oljur[illegible]kidømi uttan at fáa hjálp [illegible]á útlendskum feløgum. Vit hava hvørki ta fíggjarligu ella tøknfrøðiligu orkuna, ið krevst, fyri at vit sjálv kunnu fara undir at vinna olju úr undirgrundini. Hinvegin er oljan sera attraktiv, eitt nú fyri feløgini, sum longu nú eru virkin vestan fyri Hetland, soleiðis at hesar fyritøkur óivað vilja streggja seg langt fyri at kunna førka sítt virksemi inn á føroyska økið. Júst í hesum sambandi hevur tað avgerandi týdning, at vit standa saman um eitt føroyskt argument. Kunnu vit ikki semjast um eitt *føroyskt felagsargument,* so standa vit skjótt í teirri støðu, at vit kunnu velja ímillum at virka olju vinnuna undir treytum, ið eru settar av útlendskum oljufeløgum (og/ella Danska Statinum og DONG) og slett ikki fáa nakra oljuvinnu.

Kapping millum oljufeløgini – ikki føroyingar

Eitt nú í Norra eru nógv »góð« dømi um, at stór innanhýsis kapping um t.d. veitingarhavnir, tyrlupallar og flogvøllir er til stóran ampa fyri eitt samfelag, sum skal brynja seg ú til at taka ímóti eini oljuvinnu. Í Føroyum hava vit flakavirki, ið standa á hvørjum tanga, sum daglig prógv um avleiðingarnar av einum óskipaðum (manglandi) vinnu- og ídnaðarpolitikki. Latum okkum læra av egnum mistøkum og ikki minst av royndum úr øðrum londum.

Í mínari verð er eingin ivi um, at vit eiga at »útflyta kappingina«. Latum okkum arbeiða við eini føroyskari loysn sum byggir á eina integratión av oljuvinnuni í eitt føroyskt ídnaðar- og vinnumynstur. Latum okkum arbeiða fyri at tryggja føroyingum eitt sosialøkonomiskt tilverugrundarlag, tað veri seg í miðstaðarøkinum ella á Trøllanesi.

Mín áheitan til politisku myndugleikarnar, vinnulívið og alt Føroya fólk er: Latið kappingina standa ímillum tey útlendsku olju feløgini; latum okkum arbeiða við eini *føroyskari loysn,* har vit troyta og samskipa allar føroyskar møguleikar, áðrenn vit venda okkum uttanlands eftir hjálp. Einans við at samskipa allar góðar kreftir her á landi kann boðskapurin – »útlendingar skulu arbeiða hjá okkum og ikki vit hjá teimum« – gerast veruleiki í sambandi við eina føroyska oljuvinnu.

Suni á Dalbø
ráðgevi hjá Suður-Vestur Samtakinum